Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo



# Tummas Thomassen 60 ár



Mikudagin 24. august fylti Tummas Thomassen 60 ár. Hann er ættaður úr Svínoy, men hann hevur nógv tann størsta partin av lívinum búð í høvuðsstaðnum. Føðingardagin helt hann heima við hús í Stoffalág.

Foreldrini hjá Tummasi vóru Jenny, fødd Lind, og Kaj Thomassen. Tey vóru bæði svínoyingar, og tey vóru bæði uppvaksin úti á Bø. Húsini hjá foreldrunum hjá Jenny – Christina og Poul Fr. Lind – eru heimanfyri húsini, sum foreldrini hjá Kaj – Thomas og Fredrikka – bygdu. Kaj yvirtók húsini eftir foreldrini, og inn hagar giftist Jenny.

Jenny var fødd 29. juni í 1921, og hon doyði 17. mai í 1999. Kaj var føddur 19. oktober í 1907, og hann andaðist 21. apríl í 2003.

Jenny og Kaj fingu sjey børn. Tummas var tvíburði, men tvíburðarbeiggin doyði tveir dagar gamalur. Hini systkini eru Kristina og Páll, sum búgva í høvuðsstaðnum, Fróði sum býr í Klaksvík og Bjarti og Ólavur sum búgva úti á Bø í Svínoy.

Tá ið Tummas vaks upp úti í Svínoy vóru fleiri dreingir, sum vóru javnaldrar hjá honum. Teir fingu holla frálæru í bygdarskúlanum, har Karl Justinussen var lærari øll skúlaárini hjá Tummasi.

Tummas var skipsmaður í eini trý ár, áðrenn hann miðskeiðis í seksti árunum flutti til Havnar. Har arbeiddi hann fyrst í Landshandlinum, sum Rósing Rasmussen átti. Seinni fór Tummas til Marstein, og har var hann bókhaldari, inntil Elding yvirtók tað mesta av tí, sum Marstein hevði umboðað og selt. Síðani hevur Tummas verið bókhaldari hjá Elding. Harafturat hevur hann havt onkur onnur bókhald. Eitt nú hevur hann havt og hevur framvegis bókhaldið hjá Einars Prent, sum systkinabarn hansara, Sóley Lind, sum vaks upp saman við Tummasi, er stjóri fyri.

Tummas hoyrir avgjørt til tey stillu í landinum. Hann ger lítlan háva burturúr sær sjálvum, men hann er áhugaður í tí sum fyriferst, fylgir væl við og er fryntligur at koma á tal við.

Hóast hann hevur verið burturi frá heimbygdini í út ímóti fjøruti árum, so er Tummas framvegis ógvuliga áhugaður í og góður við Svínoy og svínoyingar. Hann vitjar javnan úti í Svínoy. Um sumrarnar fæst hann við at hoyggja, og um heystarnar eru tað fjøllini, sum eru fyri.

Í 1967 giftist Tummas við Ruth Petersen, sum er ættað úr Kaldbak. Tey eiga tvær døtrar – Ingvør og Jenny, og Tummas eigur trý abbabørn – tvær gentur og ein drong.

# Meinhard Petersen 50 ár



*Meinhard og Lydia Petersen, sum bæði eru farin um tey hálvt hundrað*

Mikudagin 24.august fylti Meinhard Petersen í Klaksvík 50 ár. Hann var í mong ár stýrimaður og seinni skipari á Norrønu, og nú er hann havnarumsjónarmaður í Klaksvík.

Meinhard er uppvaksin í Víkunum í Klaksvík. Foreldrini eru Ella, sum er ættað úr Víkunum, og Mathias Petersen, sum var ættaður av Selatrað. Hann doyði í 1997. Tey eiga seks børn – Karl Jákup, Emma, Meinhard, Erling og Lyon, sum búgva í Klaksvík, og Finn, sum er yngstur, býr í Randers.

Meinhard hevur altíð havt góðan hug til sjógvin. Skúlaárini var hann fleiri ferðir í summarfrítíðini á snelluveiðu við Háenni, sum Frits Olsen førdi. Eftir tíggju ára skúlagongd var Meinhard á fyrsta sjóvinnuflokkinum, sum gekk á Klaksvíkar Sjómansskúla. Westward Ho var nýtt sum undirvísingarkarmur, og næmingarnir vóru umborð frá mánamorgni og til fríggjadag seinnapart.

Síðani fór Meinhard við línuskipinum Norðalduni, sum Norðoya Samvinnufelag átti, og sum Andrass hjá Stellu Pól førdi. Teir royndu á Flemmish Cap, og har var Meinhard, inntil hann hevði fingið siglingstíðina. Tá fór hann á Føroya Sjómansskúla, hagani hann leyk skipsføraraprógv í 1979.

Síðani sigldi Meinhard seks ár við DFDS. Í 1985 fór hann at sigla við Norrønu, og Meinhard var hjá Smyril Line inntil í fjør. Tá ið hann segði upp og fór í land, hevði Meinhard verið stýrimaður og síðani skipari á gomlu og nýggju Norrønu í nítjan ár.

Seinasta árið hevur Meinhard verið havnarumsjónarmaður í Klaksvík.

Meinhard er fyrikomandi álitismaður, og honum dámar framvegis væl at flóta. Tað ger hann eitt nú saman við verfaðirinum, sum altíð hevur verið nógv á floti.

Meinhard er giftur Lydiu. Hon er eldra dóttur Elin og Otto Joensen í Klaksvík. Tey bæði – Lydia og Meinhard – eru javngomul og fóru bæði í skúla í Klaksvík í 1962. Lydia, sum er frisør og eisini arbeiðir sum libráðgevi, fór um tey hálvt hundrað 7. februar í ár.

Lydia og Meinhard eiga hugnaligt heim á vestara arminum í Klaksvík ella á Hamarssniði, sum tað verður nevnt. Har varð 50 ára føðingardagurin hildin mikukvøldið. Lydia og Meinhard eiga fýra børn – Oddur, Erla, Lilja og Mathias.

Lesið Sosialin - so eru tit við

## Andlát og jarðarferðir

**Emmely Forná,** Tórshavn andaðist á Landssjúkrahúsinum sunnudagin 21. august, 74 ára gomul. Bønarhald verður í Havnar kirkju fríggjadagin klokkan 18. Jarðarferðin verður leygardagin klokkan 13.

Tey, ið vilja minnast Emmely, kunnu lata Krabbameinsfelagnum eina gávu. Konto í peningastovninum.

**Brian Vang** fer til gravar úr Ringe kirke leygardagin 27. august klokkan 11.

**Elin Frederiksberg,** Klaksvík, andaðist á Klaksvíkar Sjúkrahúsi týsmorgunin, 78 ára gomul. Kistan fer úr kapellinum á Klaksvíkar Sjúkrahúsi fríggjakvøldið klokkan 18. Jarðarferðin verður úr Christianskirkjuni leygardagin klokkan 13.30.

Tey, ið vilja minnast Elin kunnu lata KFUM og K í Klaksvík eina peningagávu.

**Elspa Jegind,** fødd Høgnesen, úr Leirvík, andaðist í heiminum í Horsens týsdagin 23. august, 58 ára gomul. Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

**Else Kofod,** vanliga nevnd Elsa undir Varða, Tórshavn andaðist á Lágagarði týsdagin 23. august, 84 ára gomul. Bønarhald verður á Lágargarði fríggjadagin klokkan 19. Jarðarferðin verður úr Kirkjugarðskapellinum leygardagin klokkan 15. Sungið verður úr sálmabókini.

Tey, ið vilja minnast Elsu, kunnu lata Lágargarði eina gávu. Konto í peningastovnunum.

### 75 ár

Í dag, 26. august verður Ísak Bjarnaskor á Viðareiði 75 ár. Dagurin verður hildin hjá soninum Kristian. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### 85 ár

Í dag, fríggjadagin fyllir Ludvig Jacobsen, Miðvágur, 85 ár.

### Dagurin

**26. august. Líradagur.** Áðrenn farið varð eftir líra, lósu teir hetta ørindi:

*Inni liggja heitir og feitir*
*tit gráu í dúni;*
*ofta munnu vit snakka*
*um tykkum heima í túni.*
*Vit eru komnir at taka,*
*men ikki at keypa,*
*ikki mugu tit undan okkum*
*í avkrók leypa.*

Dagurin verður eisini róptur *líramariumessa*, men tað hevur ongan kristiligan ella kirkjuligan týdning; navnið hevur dagurin fingið bara av teimum mongu mariumessunum um heystið.

26. august eitur eisini **Ireneus** til minnis um ein halgan munk úr Lyon, sum doyði umleið 258.